# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein góð ráðstevna

Eftir fimm brunnar á landgrunninum, sum ikki hava gjørt Føroyar til veruliga oljutjóð, varð sett á sætta brunnin – ikki úti á landgrunninum enn – men hesaferð í Norðurlandahúsinum. Teir umleið 100 áhoyrarnir á oljuráðstevnuni Offshore Faroes 07, sum Oljuvinnufelagið skipaði fyri, fingu nógv áhugavert at vita, tá eitt nú umboð fyri tey bæði oljufeløgini Statoil og BP greiddu frá.

Hóast BP metir sannlíkið fyri at gera eitt fund vera 10%, so eiga vit at minnast til, at felagið her vil vera varið við sínum metingum, nú tað metti so skeivt, tá tað boraði fyrsta brunnin fyri nøkrum árum síðani. Eisini er talan um eitt sera ókent leitiøki, og tá er váðin altíð stórur. Men við útsøgnunum frá Statoil um, at møguleikin fyri at raka við er størri, tess longur niður verður borað, hevur BP avgjørt fingið góðan stuðul. Á ráðsstevnuni beyð Statoil sær at lata BP upplýsingar frá síni boring í fjør, sum so kunnu gagna boringini í summar. Afturfyri skal Statoil so fáa upplýsingar frá hesi boringini, og teir kunnu so aftur gagna Statoil í sínum framtíðar leitivirksemi á landgrunninum.

Hóast vit fingu nógv at vita um bæði Brugduna og William, so varð Rosebankfundið bretsku megin markið tað, ið fekk mestu positivu umrøðuna, tí hetta oljufundið kann fáa positiva ávirkan á framtíðar leiting við Føroyar. Í løtuni verða boraðir tríggir brunnar har, sum skulu siga okkum meira um støddina og hvussu tætt upp at markinum fundið gongur. Ein útbygging til oljuframleiðslu á hesi leið fer heilt givið at fáa stóran týdning fyri leitingina og møguliga útbygging okkaru megin í framtíðini.

Vit fingu eisini at vita, at tað gongur móti ljósari tíðum, hvat brunnum á Atlantsmótinum viðvíkur. Tað verður munandi lættari at fáa boriskip og –pallar til hesa leiðina komandi árini, og kunnu vit rokna við vaksandi leitivirksemi longu í 2008 og 09.

Ráðstevnan setti eisini fokus á leiklutin hjá føroyskum ídnaði og varð útmeldingin hjá landsstýrismanninum í oljumálum púra greið. Keikanturin verður varðveittur, soleiðis at føroyskt vinnulív framhaldandi sleppur at vera við í virkseminum. Vit hoyrdu eisini, hvussu gongur hjá fleiri av teimum fyritøkunum, sum hava ment sítt virksemi sum part av oljutilgongdini. Tað stendur greitt, at hóast ikki dropin av olju er komin upp úr undirgrundini enn, so hevur avleidda virkssemið av leitingini, longu ment mong nýggj arbeiðspláss og skapt munandi inntøkur til samfelagið. Vit kunnu tí í dag staðfesta, at føroyski oljuídnaðurin er við at festa røtur, og tekin eru til, at hesin parturin av vinnulívinum er komin fyri at verða, nú vit eisini vaksa um okkara virksemi uttanfyri landoddarnar. Verður eitt fund gjørt í ár ella í 2008, so er greitt, at hesin parturin fer at gerast enn meiri týðandi í samlaða samfelagsmyndini.

**Sosialurin**

## Óttist ikki tí Bill hevur talað

**SYLVINTUR GÍSLASON**
Reykjavík

So var hesin Bill Justinussen aftur úti við rívuni, eftir at Sosialurin hevði eina sera beinrakna oddagrein um samanvavstur av politikki og átrúnaði, sum alsamt meiri hevur verið at sæð til í seinastuni í Føroyum. Bill gjørdi einki minni enn at leggja Sosialin undir at vera farnan í heilagan bardaga móti Miðflokkinum – sikken eitt skotsmál!

Hann er skjótur í boksihandskarnar, hesin grimdarhugaði religiónspolitikarin, og fyri góðum mánaði síðani var ikki lukkuligt at standa fyri, tá hann legði eftir Sjúrði Skaale, tí hesin hevði dittað sær at siga nøkur kritisk orð um framferðarháttin hjá formanninum í sama Miðflokki, tá málið um broytingina í grein 266b var fyri á løgtingi.

Flestu fólk tíma illa í eitt blaðkjak við slíkar religiónsfanatikarar, tí vit vita, at tað er sum ein skrúva uttan enda at kasta seg út í slíkan polemikk – líka mikið hvat tú sigur, hvussu rætt tú hevur, og hvussu dyggiliga teir verða settir skákmát, so rínur einki við teir kortini, tað prellar alt av eins og gummikúlur móti einum betonveggi.

Tá tað fyri nakað síðani gjørdist alment, at Dimmalætting fær nýggjan blaðstjóra, tá gjørdi Bill einki mætari enn at koma við "góðum ráðum" til nýggja blaðstjóran, sum í botn og grund ikki var annað enn ein duld hóttan, um, at skal blaðnum verða lív lagað í framtíðini, so skal redaktiónin bera fram offurlamb fyri ásjón Bills. Hetta offurlambið er at leggja lok á allan tíðindaflutning, sum ber brá kritikki mótvegis teokratiska og anti-demokratiska framferðarháttinum hjá Miðflokkinum, teirra veljarum og teirra líkum.

Anti-demokratiskt er tað víst, tá hesir løgtingslimir, beint eftir at uppskotið um at banna diskriminering av fólki vegna teirra seksuellu orientering, ikki virdu demokratisku viðgerðina, men ætlaðu sær í óðum verkum at fáa málið út til fólkaatkvøðu, eftir at tað longu var vorðið parlamentariskt samtykt.

Fanatisman er eyðsýnd, og hetta hóast eingin homofobikari nýtist at fáa ilt í ein ávísan enda, tí eingin noktar teimum at liva tað lív, teir vilja.

Tí hesa áheitan á allar fjølmiðlarnar: Missið ikki fótafestið hóast óðir religiónsfanatikarar hótta. Tit standa tykkum best við framhaldandi at lýsa øll samfelagsviðurskifti á ein so óheftan hátt sum gjørligt, eisini um tað gongur religiónsfanatikarum ímóti.

## Javnaðarflokkurin vil hava kvinnuna fram

**Tað hevur avgerandi týdning, at kvinnur koma fram at avgerðunum í samfelagnum. Tiltakið 8. mars á Hotel Føroyum er liður í hesum arbeiði. Tí hevur Javnaðarflokkurin gjørt av at rinda fyri luttøkuna hjá 18 fólkum úr øllum teimum sjey valdømunum og úr leiðslu floksins**

**TÍÐINDASKRIV**
*Føroya Javnaðarflokkur*

Javnaðarflokkurin harmast um tað niðrandi viðferð, ið arbeiðið at menna kvinnuluttøkuna í politikki hevur fingið í løgtinginum í seinastuni. Sum javnaðarfólk eru vit sannførd um, at eitt javnt valdsbýti ímillum kvinnur og menn er ein av fortreytunum fyri einum betri samfelag.

Tað var Javnaðarflokkurin, ið tók stig til at skipa nevnina, ið skuldi arbeiða fyri øktum kvinnuleikluti í politikki. Demokratia hevur longu skipað fyri ókeypis tiltøkum til frama fyri hesum endamáli. At tað nú verður skipað fyri einum størri tiltaki er uttan iva neyðugt, fyri veruliga at fáa hetta umráðandi mál sett á dagsskrá. Tíverri eru slík tiltøk vorðin kostnaðarmikil at skipa fyri.

Men fyri at so nógv sum gjørligt skulu hava møguleika at luttaka, hevur Javnaðarflokkurin gjørt av at rinda fyri luttøkuna hjá 9 kvinnum og 9 monnum úr øllum teimum sjey valdømunum og úr leiðsluni í flokkinum. Orsøkin til, at vit bæði senda kvinnur og menn er, at vit eru av teirri fatan, at málið um javnstøðu ikki verður rokkið, um ikki bæði kynini kenna tað sum eitt felags mál at røkka javnstøðuni.

## Avsannan

**HEÐIN SAMUELSEN**
Dánjalstrøð 4, HB-ari, fyrrv. lærari



Av tí at tað eru so nógv, sum halda meg hava skrivað grein um Paula Ellefsen í Sosialinum herfyri, boði eg frá, at so er ikki. Tað hevði eg iki sæð meg føran fyri.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.